2. november 2009

Tíðindaskriv

Metingarboringin á Tornado fundinum vestan fyri Hetlandsoyggjarnar væleydnað

Faroe Petroleum boðar frá, at felagið nú er liðugt at bora síðusporsbrunnin á Tornado fundinum vestan fyri Hetlandsoyggjarnar. Felagið eigur 7,5 prosent av Tornado fundinum. OMV er fyristøðufelag á loyvinum, og eigur 35 prosent. Havdýpið, har sum borað varð, er 1.048 metrar, og síðusporsbrunnurin varð boraður niður á 8.654 fóta dýpi. Tað er boriskipið Stena Carron, sum hevur borað brunnin.

Olja og gass vórðu funnin í upprunaliga leitibrunnurin 204/13-1 í eini umleið flá uppá 90 føtur, við einum miðal poknustigi uppá 28.5%. Í síðusporsbrunninum, 204/13-1Z, var ein flá uppá umleið 120 føtur funnin, við einum poknistigi uppá 29%. Tjúgdin, støddin og góðskan á jarðgoymsluni eru í tráð við forsøgnirnar undan boringini. Fleiri royndir eru tiknar upp av kolvetninum, sum er funnið.

Tornado fundið liggur umleið 10 km í ein útnyðring frá Suilven oljukelduni, og 30 km í ein útnyðring frá Schiehallion, Foinaven og Loyal framleiðslueindunum, og liggur bert 3 fjórðingar frá føroyska markinum. Umframt OMV og Faroe Petroleum, luttaka Dana Petroleum við 30 prosentum, Dong Energy við 20 prosentum, og Idemitsu við 7.5 prosentum.

Úrslitið av Tornado metingarbrunninum er sera væleydnað, og staðfesti týðandi nøgdir av kolvetni. Sum heild er úrslitið betur enn upprunaliga mett, og í gassfláini varð funnin betri góðska enn upprunaliga mett. Tornado fundið hevur eisini týðandi ávirkan á loyvi 002 á føroyskum øki, og á loyvi P1552 (Marjun loyvi) á bretskum øki. Nýggjar verkætlanirnar verða nú gjørdar fyri hesi øki, við støði í úrslitinum frá Tornado fundinum.

Tornado er annar av fimm brunnum á Atlantsmótinum hjá Faroe Petroleum. Gass varð funnið á Glenlivet, tann fyrsti av teimum fimm brunnunum, har metingarboringar verða gjørdar í løtuni. Boriætlanin á Atlantsmótinum heldur fram við Anne Marie oljuleitimiðinum á føroyskum øki og Cardhu og Lagavulin oljumleitimiðunum á bretskum øki. Hesir tríggir brunnarnir verða væntandi boraðir í 2010.

Fulfíggjað tíðindaskriv á enskum er á heimasíðu felagsins www.fp.fo

Kort yvir Tornado leitimiðið